# Temadagar um menningartarnað við sálarligum trupuleikum

TEMADAGUR

*Tíðindaskriv frá Javn*

Kanningar í Danmark hava víst, at umleið triði hvør vaksin við menningartarni eisini hevur ella fær sálarligar trupulleikar. Kortini er ikki nógv gjørt við dupultdiagnosur av hesum slagi, og mong fakfólk bæði innan almanna- og heilsuverk halda seg hava ov lítlan kunnleika til tílíkar dupultdiagnosur, ið krevja tvørfakligt samstarv.

Javni hevur sett sær sum mál at virka fyri fakligari menning hjá teimum starvsbólkum, ið hava við menningartarnað fólk at gera.

Sum eitt stig á leiðini fer Javni tann **26. og 27. september** 2005 at skipa fyri tveimum temadøgum undir heitinum: **Menningartarnað við sálarligum trupulleikum**. Hetta tiltak vendir sær fyrst og fremst til fakfólk á økinum, sum arbeiða við menningartarnaðum ella við sálarliga sjúkum. Leiðarar á Serstovnaøkinum luttaka eins og starvsfólk frá psykiatriska deplinum. Undirvísari verður Kristian Wedel, senior-konsulentur hjá SUS.

SUS (Socialt UdviklingsCenter) skipar fyri ráðstevnum og temadøgum ymsastaðni, og hava eisini áður havt onkra ráðstevnu í Tórshavn. Nú hava vit eftir áheitan fingið sendandi eina skrá fyri tveir temadagar. Skráin er sera áhugaverd og viðkomandi.

Pláss verður fyri 40 luttakarum, og bert nøkur pláss eru framvegis eftur. Temadagarnir verða hildnir í hølunum hjá **Starvsmannafelagnum 26. og 27. september 2005**, og matur verður at fáa í døgurðasteðginum. Kostnaðurin fyri báðar dagarnar er kr.1.000,-

Umframt temadagarnar verður skipað fyri almennum fyrilestri um sama evni tann 26. september kl.19.30 á Verkstaðnum Vón á Argjum.

Áhugað kunnu venda sær til skrivstovuna hjá Javna á tlf. 31 48 27 týsdag til hósdag kl. 10. til 14 ella við telduposti: skriv@javni.fo

# Kubbasparing í oljufýrdum ketlum?

**Hans Birgir Hansen**

Vit kunna við kubbasparing í oljufýrdum ketlum spara meira enn helvtina av samlaðu oljunýtslu í landshúsarhaldinum kring alt landið og í Havnini. Vit kunna somuleiðis fáa størri útnyttan av øllum spillihita í fer við rúkandi ferð út í skorsteinin og upp ígjøgnum hendan til onga verðsins nyttu.

Vit kunna bert við at taka út leysu múrsteinar í forbrenningskamarinum í oljufýrdum ketlum niðurseta ferðhitan so vit fáa betri útnyttað hendan enn ídag.

Vit kunna fáa størri javnvág í hitanýtslu opna vit termostatir/ventilar á øllum radiatorum í øllum húsarúmum og síðan lækka hendan við chuntventil.

Vit kunna við mynstu loyvdu dysustødd í brennaranum í oljufýrdum ketlum avgera oljunýtslu.

Vit kunna við rørskálum bjálva heitvatnsrør frá oljufýrdum ketlum til brúsir /kranar/radiatorar/skapagrundarlagið fyri størri kubbasparing við kubbanum.

Nú hevur ein so givið alment innlit, gjøgnumskygni, opinleikan hvussu øll kunna spara olju og fáa ókeypis upphiting í øllum landshúsarhaldinum ídag.

Spardi peningurin kann nýtast til bjálving av heitvatnsrørum sum áðurnevnt og innandura og uttandura bjálving í gevur størri kubbasparing sum áðurnevnt.

# Yvirandaligheit

**Christian Fróði Djurhuus**

Eru tit á Lindini og Rás2 greiðir yvir, at við at varpað út hesar sokallaðu lærdómar og setningar, bert gera at fólkið fer longur og longri út at søkja tað ókenda og okkulta? tit eru ein byra hjá tí einsataka heilsu- og sinnisbrekaða. Vekingin byrjar ikki við at hoyra og ikki fata. Latið vera við at leggja so stóran dent á hvussu menniskju skulu uppføra seg, tí at tey síggja ikki tykkum sum í spegilin!

Nei, latið okkum heldur stevna móti, at savnast saman øll, ung sum gomul, frísk sum sjúk, at lesa og hoyra reina og óspilta Guds Orð.

## KROSSORÐ



### Vinnari:

*Tomasia Njálsdóttir*
*850 Hvalba*

### Loysnin frá seinastu viku
### Loysunarorðið: KALDBAKSNES




### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

Loysunarorðið: .......................................... **433**

Navn: ..........................................................

Bústaður: ..................................................

Bygd/býur: ..................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkur** - *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** - *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** - *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** - *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** - *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***